

Færøernes Mellem- og Realskole:

# Millumskúlaflokkur í 1964

REALSKÚLIN 1964

Í sambandi við eina framsýning sum verður á ólavsøku í ár í gamla realskúlanum í Havn leitar Jórunn Dánialsdóttir eftir myndum av lærarum og mæmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966. Jórunn heitir á tey, sum eiga myndir frá hesum tíðarskeiði, um at ringja til sín á tel. 316024 ella 226024. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

Í dag hava vit mynd av millumskúlaflokkinum 4.b í 1964. Aftara rað f.v.: Borghild Køtlum, Arnbjørn Borgarlíð, Carl Johannes í Stórustovu, Hjalti Skaalum, Óli Reinert, Helgi Fossadal, Rólant í Skorini, Arni Rein, Páll Sumberg Olsen, Pauli Mortensen, og Eyðbjørg Joensen

Miðraðið f.v.: Sólrun Midjord, Elisabeth Johannesen, Jógvan við Ánna (lærari), Sanna Waagstein Johansen, og Anna Sofía Restorff

Fremsta rað f.v.: Marjun C. Joensen, Ása Joensen, Gunvør av Reyni, og Annebeth Rubeksen.

Hesi eru ein partur av teimum, sum vóru gingu í realskúla eftir tí gomlu realskúlaskipanini. Tey vóru liðug í 1965. Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í samband við myndna, er viðkomandi vælkomin at kontakta Jórunn Dánialsdóttir.

*Myndaeigari: Anna Sofía Restorff*

# Lars Larsen 80 ár



Leygardagin 3. mars fylti Lars Larsen í Havn, stjóri á Flogfelag Føroya, 80 ár. Í hesum sambandi var móttøka á Hotel Vágum hendan dagin.

Lars er ættaður av Tvøroyri, men flutti sum smádrongur til Sørvágs, tá pápin Christian Larsen gjørdist sýslumaður í Vágum í 1934.

Lars má metast sum ein pionerur innan flogferðslu í Føroyum. Tað var longu í 1961, at hann setti seg í samband við Iceland Air fyri at vita, um teir høvdu áhuga í at flúgva til Føroya. Í juni mánað í 1963 tók Lars saman við Hugo Fjørðoy í Sørvági stig til at stovna Flogfelag Føroya.

Eingilskmenn bygdu undir seinna veraldarbardaga flogvøllin í Vágum. Eftir at kríggið var endað, og eingilskmenn vóru farnir av landinum, stóð flogvøllurin so at siga ónýttur. Sjálvur hevði Lars Larsen starvast saman við eingilsku hermonnunum á flogvøllinum, so hann kendi til flogvøllin.

Søgan um Flogfelag Føroya er samstundis eisini søgan um ferðafólkaflúgving til og úr Føroyum. Tað var Flogfelag Føroya, sum tók tey fyrstu stigini til at fáa regluliga flúgving til Føroya.

Mánadagin 12. mars frá kl. 16-18 verður móttøka hjá Flogfelag Føroya í Gundadali í sambandi við at felagið nú er selt øðrum eigarum. Í hesum sambandi koma vit at skriva meira um Lars Larsen og Flogfelag Føroya fyrst í komandi viku.